# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Gretha Joensen – ein megnar kvinna – 75 ár

### 16. oktober 2007

Tað er við stórari gleði og takksemi, at vit í felag taka penn í hond og ynskja Grethu Joensen hjartaliga tillukku við 75 ára degnum. Vit hava nógv at takka fyri, tá ið vit minnist aftur á tær mongu góðu løturnar, sum vit hava upplivað saman við tær, tey síðstu 25 árini, tú og maður tín, Levi, hava rikið Malta í Hirtshals.

Tær hava verið óteljandi góðar løtur, har Gretha hevur hugnað um okkum føroyingar, ið hava siglt út frá Hirtshals. Ikki kann sigast annað enn, at Gretha ofta er komin í móður stað. Hon hevur altíð verið klár at geva okkum eina hjálpandi hond. Líkamikið um tað var



bobb, fótbóltur, matur ella buksur, ið skuldu leggjast upp. Nógv góð minni eru eisini frá kolunihavanum, har nógvir føroyskir sjómenn hava sligið gras, hentað jarðber, rabarbur o.s.fr. Tá ið sólin bakkaði niður hevur hesin garður eisini verið deiligur at beistast í ella bara slappa av í. Eisini hevur knalertin mangan verið kærkomin.

Malta, og alt tað megnar arbeiði, ið hjúnini Joensen har hava staðið fyri, hevur mangan tænt okkum føroyskum sjómonnum í Hirtshals væl. Áðrenn fartelefonin kom, var tað lætt at fara niðan á Malta at ringja, lesa bløðini ella bara at frætta tíðindi heiman í frá. Eisini er tað eitt hugnaligt stað at møta øðrum føroyingum, og at sleppa at hoyra evangeliið á móðurmálinum. Og aftaná møtini, er Gretha altíð klár við einum góðum kaffimunni. Slíkar løtur eru ikki lættar at gloyma.

Vegna hetta vilja vit takka tær fyri alt tað, tú hevur verið fyri okkum, tey mongu góðu minnini og alt tú hevur gjørt fyri okkum. Enn eina ferð ynskja tær hjartaliga tillukku á 75 ára degnum. Harrin signi framtíð tygara.

Kærar heilsanir

**Nakrir vælnøgdir føroyskir sjómenn í Hirtshals**







## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara elskaða kona, mamma, vermamma, omma og langomma

**Karolina Betty Frederikka Berg**
vanliga nevnd Linnebett

andaðist og fór heim til Harran
Tøkk til starvsfólk og búfólk á sambýlinum í Skálavík.
Tøkk til sangkórið í Ebenezer.
Tøkk til tykkum, sum við vitjanum, uppringingum og heilsanum hava troystað.
Tøkk til tykkum, sum komu til jarðarferðina
Tøkk til tykkum øll, sum við blómum, kransum og á ymiskan hátt mintust Karolinu

*Familjunnar vegna*
**Johannes**
**Ann-Mari, Rúni, Maj-Britt og Magnus**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá elskaði sonur og bróðir okkara

**Bjarni Berg**

andaðist og fór heim til Harran.

Tøkk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til tykkum, sum við vitjanum, uppringingum og heilsanum annars hava troystað.
Tøkk til tykkum, sum komu til jarðarferðina.
Tøkk til tykkum øll, sum við blómum, kransum og á ymiskan hátt mintust Bjarna

*Familjunnar vegna*
**Johannes**
**Ann-Mari, Rúni, Maj-Britt og Magnus**